WWW.SKIPALISTIN.FO

# Skipalistin nú eisini á internetinum

Ein hin best umtókta føroyska bókin í nýggjari tíð er nú eisini tøk á Internetinum. Pappírs-útgávan av Skipalistanum hevur, síðani hon kom fyrstu ferð, verið ein av best umtóktu føroysku bókunum, og nú ber eisini til at leita fram stórar partar av rúgvusmikla tilfarinum í Skipalistanum á internetinum.



SKIPALISTIN hentur at hava - bæði sum bók og nú eisini á netinum

Í bókini eru hentar og álítandi upplýsingar um øll før í føroyska flotanum umframt aðrar upplýsingar um tað, ið viðvíkur sjógvi og sjóvinnu yvirhøvur. Og so eru sjálvandi eisini vælkendi myndprýddi skipalistin, føroyskur álmanakki og streymkort partar av Skipalistanum.

Eitt av aðalmálunum hjá Skipalistanum er at veita álítandi og dagførdar upplýsingar um føroysku høvuðsvinnuna. Eitt miðvíst arbeiði verður gjørt at dagføra bókina á hvørjum ári og at tryggja at alt er so rætt og eftirfarandi sum yvirhøvur til ber.

Men tað er tó ein royndur lutur, at føroyski skipaflotin broytist støðugt. Skip fara og onnur koma til landið, meðan aftur onnur fara á aðrar hendur.

Tað er tí ein náttúrlig menning av Skipalistanum, at dagførdar upplýsingar um skip og bátar í føroyska flotanum nú verða at finna á www.skipalistin.fo

Heimsíðan er skipað soleiðis, at til ber at leita skjótt og lætt eftir upplýsingum um øll før størri enn 5 bruttotons. Internetloysnin gevur hópin av ymiskum leitimøguleikum, og tað er einfalt og høgligt at finna tey skipini, ið lúka júst tíni leitikrøv.

## Vanlig leiting

Sum heitið kanska bendir á, so er »vanliga leitingin« fyri tey, ið vita nokkso væl, hvørjum leitað verður eftir. Her ber til at leita eftir einum ella fleiri av hesum 6 møguleikunum:

- Skipanavn,
- Heimstaður,
- Skipaslag,
- Smíðiár,
- Longd og
- Bruttotons

Síðani ber til at trýsta á tað skipið, ið tú ynskir. Nú kemur fram nýggj mynd, har allar upplýsingar um hetta skipið koma fram við tilhoyrandi litmynd av skipinum. Tað ber nú eisini til at trýsta á einstøku tupplýsingarnar, ið koma fram sum úrslit av leitingini. Trýstir tú á, eitt nú »Útgerðarmann«, so koma øll skipini fram, sum hava henda sama útgerðarmann.

## Dømi um leitiúrslit frá vanligari leiting

Víðkað leiting

Víðkaðu leitimøguleikarnir geva enn fleiri møguleikar at finna júst tað, ið leitað verður eftir. Hetta kann vera sera hent, um brúkarin hevur onkran serligan áhuga ella ynskir at finna eitt ella fleiri skip við onkrum ávísum eyðkennum. Um leitað verður undir, t.d. heimstaði og maskinu, ber til at síggja júst hvørji skip heimahoyrandi í, eitt nú Klaksvík, hava eitt ávíst maskinslag ella eina ávísa maskinorku.

Tað ber eisini til at síggja hvørji línuskip eru í Føroyum, ella bara hvørji av hesum hoyra heima á Tvøroyri, hava Grenaamaskinu við millum 500 og 800 hestum, eru millum 25 og 30 metrar til longdar og eru bygd millum 1970 og 1980.

Við øðrum orðum ber til at skipa sær leitingina júst soleiðis ein ynskir.

Tú fært 14 ymiskar leitimøguleikar, og teldan gevur júst tað svarið, tú sóknast eftir.

Undir »Ymiskt« er føroyskur álmanakki, streymkort og streymtalvur at finna. Undir »Slóðir« finnast hópur av áhugaverdum heimasíðum, sum so ella so eru viðkomandi hjá teimum, ið hava áhuga fyri sjóvinnu og tí, ið har til hoyrir.

Á www.skipalistin.fo ber eisini til at bíleggja Skipalistin 2000, 2001 og 2002. Hetta er hent hjá teimum, sum ikki longu hava ognað sær allar Skipalistarnar í røðini.

Eisini ber til at skráseta teldupostadressu sína hjá Skipalistanum. Tey, ið gera hetta, fara at fáa ymiskar tíðindastubbar umframt dagføringar av Skipalistanum so skjótt, sum hesar verða skrásettar.

Tað er eyðsæð, at Skipalistin á netinum verður eitt hent amboð hjá teimum, ið ynskja feskastu upplýsingarnar um føroyska flotan, og sum ynskja at finna fram til hesar upplýsingar skjótt og lætt.

Skipalistin á netinum er at finna á: www.skipalistin.fo











# TeleTænastan hevur ment seg nógv

**- Vit vilja skapa fortreytir hjá okkara sjófólki at vera við í menningini á landi innan kunningartøkni, sigur TeleTænastan**

TØKNI

*Vilmund Jacobsen*

Hóast TeleTænastan er ein ung fyritøka, hevur hon ment seg nógv innan fylgisveinatænastur til okkara sjófólk. Tá ið talan er um fylgisveinasamrøður, situr TeleTænastan í dag á 90-95% av føroyska marknaðinum.

## Sjófólk og menning

- Eitt av okkara endamálum er er at skapa fortreytir hjá sjófólki okkara, so hesir eisini kunnu fáa lut í menningini á landi innan kunningartøkni. Her hugsa vit eitt nú um internet samband, teldupost skipanir, dataflutning og samskipan av fiskiflotanum, sigur Billy Hansen, stjóri á TeleTænastuni.

## SkipsSosialurin

Hann vísir á, at TeleTænastan kann bjóða føroyskum skipum eina teldupost adressu, soleiðis at teir gjøgnum hana kunnu fáa SkipsSosialin.

- Hetta verður gjørt við einum programmi, sum verður instalerað umborð. Eitt ávíst tíðarskeið á degnum syrgir programmið so fyri, at postkassin verður kannaður, so greiða fæst á, um teldupostur er komin, sigur Billy Hansen á TeleTænastuni.





*TeleTænastan kann bjóða føroyskum skipum teldupost adressu, soleiðis at teir gjøgnum hana kunnu fáa SkipsSosialin*


